Skjal B.

Til Uttanlandsnevnd Løgtingsins

Við hesum loyvir Reiðarafelagið fyri Handilsskip sær at koma við nøkrum viðmerkingum í sambandi við nevndarviðgerðina av løgtingsmáli 123/2018 um yvirtøku av málsøkinum sjórættur.

Tað kann undra, at uppskotið fyrst verður lagt fyri Tingið, og at arbeiðið við at lýsa avleiðingar og neyðugar tillagingar síðan verður gjørt. Sum er, er tað longu ein avbjóðing fyri føroyskar myndugleikar at finna neyðugu orkuna at fylgja viðkomandi altjóða sáttmálum og arbeiðnum við hesum, og tað verður avgjørt ikki lættari við at yvirtaka sjórættin allan sum hann er.

Tað verður í viðmerkingunum til uppskotið víst á, at tað skulu vera stundir at viðgera yvirtøkuna inntil á ólavsøku 2020. Hetta fyri at tryggja, at yvirtøkan ikki fer at ávirka føroyska sjóvinnu negativt. Tað er sjálvsagt gott, at víst verður á hetta, og eisini at vinnan eftir ætlan verður tikin við í arbeiðið. Tó fer Reiðarafelagið fyri Handilsskip við hesum teldupostinum at leggja dent á, at tað er ógvuliga týdningarmikið og grundleggjandi, at ein yvirtøka av økinum ikki fær negativar avleiðingar fyri føroyska sjóvinnu.

Shipping og handilsflotin er ein hin mest altjóða regulerað vinnan við altjóða sáttmálum og reglum. Vinnan virkar á altjóða marknaðum undir altjóða treytum, og um Føroyar ikki liva upp til hesi altjóða krøv í tí løtu málsøkið er yvirtikið, fer føroysk sjóvinna at líða undir hesum. Tað er ikki rúm fyri einum skiftistíðarskeiði e.l.

Vinnan hevur einki ynski um, at málsøkið verður yvirtikið. Vit kunnu staðfesta, at yvirtøkan verður fram orsakað av eini politiskari semju í februar, men vit síggja stórar vandar í at skunda hetta málið ígjøgnum. Reiðarafelagið fyri Handilsskip ynskir tí við hesum staðiliga at gera vart við týdningin av, at tað verður tryggja, at Føroyar eisini framhaldandi og til eina og hvørja tíð yvirhalda allar altjóða skyldur, soleiðis at vinnan kann virka á sama støði sum í dag.

Vinarliga
Esther Dahl

**Reiðarafelagið fyri Handilsskip**
Shipowners of the Faroe Islands